

*– Tað verður ein fyrimunur fyri fiskamarknaðin – og ikki minst fyri skipini og manningarnar, at ein keypari kemur aftrat, heldur Jóhannes Olsen, stjóri í Friomar í Føroyum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Norðmenn hava keypt fiskavirkið við Norðskála

**– Vit fara at keypa longu, brosmu, havtasku, steinbít og møguliga onnur fiskasløg á marknaðinum. Fiskurin verður skildur og pakkaður til útflutnings, sigur stjórin í felagnum, Jóhannes Olsen**

EIGARASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskavirkið við Norðskála, sum Árni Dam og aðrir áttu, hevur nú skift eigara. Tað er felagið, Friomar, sum hevur keypt bygningin, og stjóri í felagnum er Jóhannes Olsen á Toftum, sum frammanundan eigur línuskipini, Eysturoying, Sigmund og Morgunstjørnuna.

Jóhannes sigur, at norska felagið, Friomar, sum eigur peningin í felagnum, eitt nú fer at keypa longu, brosmu, havtasku, steinbít og møguliga onnur fiskasløg.

– Fiskurin, sum verður keyptur á marknaðinum í kapping við aðrar keyparar, verður skildur og pakkaður við Norðskála.

Jóhannes sigur, at Friomar í Noregi er eitt stórt og framkomið felag, sum tekur sær av at útvega rávøru til ymiskar keyparar, bæði í Noregi og í evropeisku londunum annars.

Hann sigur, at kappingarneytarnir í Føroyum í fyrsta lagi eru tey virki, sum salta longu og brosmu og keypa hini fiskasløgini.

## 5-7 fólk

Stjórin í Friomar í Føroyum væntar, at eini 5-7 fólk fáa arbeiði á fiskavirkinum við Norðskála, og ætlandi byrjar virksemið á virkinum í komandi viku.

– Í fyrstu atløgu verður so byrjað við at keypa, skilja og útflyta fiskin heilan.

Jóhannes Olsen heldur, at tað verður ein fyrimunur fyri fiskamarknaðin – og ikki minst fyri skipini og manningarnar, at ein keypari kemur aftrat.

– Jú, eg haldi, at hetta verður eitt spennandi og mennandi samstarv við norðmenn, sum nú verður sett á kjøl, sigur stjórin í Friomar í Føroyum.

Føroya Agnsøla:

# Tekur upp kappingina við Kamb

**Jóha nnes Olsen á Toftum og Rólant Poulsen á Eiði hava stovnað nýggja agnsølu, PO-Trade**




AGNSØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stóri útbjóðarin av agni til føroysku línuskipini og útróðrarbátarnar, P/F Kambur á Strondum, fær nú eftir øllum at døma ein rættiligan kappingarneyta.

Jóhannes Olsen á Toftum, sum eigur trý línuskip og Rólant Poulsen á Eiði, sum eisini hevur átt línuskip, hava stovnað felagið, PO-Trade, sum stendur fyri Poulsen og Olsen.

Undirnavnið hjá felagnum er Føroya Agnsøla, og Jóhannes Olsen sigur, at felagið fer at taka upp kappingina sum útbjóðari av agni til føroyska línuskipaflotan og útróðrarflotan.

Alt bendir á, at P/F Kambur, sum hevur verið rættiliga einaráðandi á marknaðinum við góðum agni og góðari tænastu, nú noyðist at leggja seg í seðlan, um felagið ikki skal missa burtur av sínum marknaðarparti.

Jóhannes Olsen sigur, at Føroya Agnsøla longu er komin í gongd og hevur selt agn til línuskip og útróðrarbátar.

– Vit hava fingið rættiliga góðar afturmeldingar frá keyparum, og vit eru sera spentir upp á hesa nýggju uppgávu, sigur hann.

Línuskipaeigarin sigur, at fyribils bjóðar Føroya Agnsøla út hogguslokk og sauri, sum er ein makrellíknandi fiskur.

– Vit fara eisini at bjóða út makrel, men hetta verður føroyskur makrelur, og vit ætla at leggja okkum eftir teirri støddini av makreli, sum er væl egnaður til egningarmaskinurnar hjá línubátunum.

Jóhannes Poulsen sigur, at prísurin á hogguslokki hjá Føroya Agnsølu er 10 kr./kg., og hann heldur, at tað er einar 2-3 krónur minni, enn hin útbjóðarin selir hogguslokkin fyri í løtuni.

– Ígjøgnum eitt heilt ár kann ein prísmunur upp á einar 2-3 kr./kg. hava veldugа stóran týdning fyri raksturin hjá teimum, sum royna við línu.

Jóhannes Olsen sigur, at hogguslokkurin, sum felagið selir, er amerikanskur, og hann er soleiðis frystur, at keyparin fær lutfalsliga nógv agn í hvørjum blokki.

# Opin arbeiðsmarknaður og størri búskaparvøkstur

**ES-nevndin mælir til at lata upp arbeiðsmarknaðin fyri borgarunum í nýggju ES-londunum. Tað vísir seg nevniliga, at tey trý londini, sum í 2004 valdu at lata arbeiðsmarknaðin upp fyri nýggju limalondunum, hava havt ein størri búskaparvøkstur enn tey, sum valdu at hava verjutiltøk**

ES
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tann 1. mai fyri tveimum árum síðan fekk ES tíggju nýggj limalond. Flestu ES-limalondini valdu tá at seta ávís "verjutiltøk" í verk móti arbeiðsmegi í teimum nýggju limalondunum, men Svøríki, Bretland og Írland avgjørdu at halda fast um ein opnan arbeiðsmarknað.

Verjutiltøkini ella undantøkini, sum londini settu í gildi mótvegis teimum nýggju limalondunum, skulu endurskoðast innan fyrsta mai í ár, og í hesum sambandi hevur ES-nevndin gjørt eina kanning av arbeiðsmarknaðinum.

Henda kanning er nú almannakunngjørd, og niðurstøðan er greið.

Vinnuhúsið hevur hugt at niðurstøðuni, sum sigur, at tey trý londini, sum valdu at halda fast um ein opnan arbeiðsmarknaði, hava havt størri búskaparvøkstur og ein størri vøkstur í arbeiðsplássum enn hini londini.

– Vøksturin í hesum londum tekur sjálvandi ikki bara støði í tí opna arbeiðsmarknaðinum, men hinvegin hevur tað, at tey valdu at geva nýggju ES borgaranum fría atgongd, als ikki verið nakar báði, skrivar Vinnuhúsið um kanningina.

– Óttin fyri, at tilflytarar úr nýggju limalondunum fóru at føra til arbeiðsloysi, var ógrundaður. Nógv færri enn væntað hava leitað sær til gomlu limalondini.

Kanningin vísir, at í flestu av teimum 15 gomlu limalondunum, er minni enn 1% av arbeiðsmegini komin úr nýggju limalondunum. Írland er tó eitt undantak; har eru heili 3,8% av arbeiðsmegini tilflytarar úr nýggju miðevropeisku limalondunum.

– Hetta hevur tó bert ávirkað írska arbeiðsmarknaðin og búskapin positivt, tí hesi fólk taka størv sum vanligi írin ikki vil hava.

Sum heild vísir kanningin, at í økjum, har flest fólk úr nýggju limalondunum hava funnið størv, eru eisini fleiri størv skapt til lokalu arbeiðsmegina.

– Í kanningini verður eisini víst á einstakar trupulleikar, og at fakfeløg eitt nú hava víst á óorganiseraða arbeiðsmegi, men hetta broytir ikki heildarmyndina, skrivar Vinnuhúsið.

Kanningin vísir eisini, at sokallaðu "forðingarnar" hjá fleiri av gomlu ES-londunum hava lítlan týdning, tí til ber at fáa arbeiðsmegi inn, um tørvur er á tí. Hetta vísa hagtølini eisini.

Miðlar í ES-londunum vænta tí, at verjutiltøkini fara at vera linkað ella slept í flestu londum.

– Eitt nú hava Spania og Grikkaland boðað frá, at tey væntandi fara at taka av allar forðingar, og fleiri av hinum londunum siga seg umhugsa at linka forðingarnar, skrivar Vinnuhúsið.